# Uppreisnin kjarnin í gleðisboðskapinum



*Maria græt tí grøvin var tóm, men júst í tómu grøvini liggur gleðiboðskapurin*
*(Mynd úr bókini, Bíblian í orðum og myndum)*

**Fornfrøðingar og søgugranskarar siga, at eingin tilburður í fornari søgu er so væl skjalprógvaður løgfrøðisliga og søguliga av sjónarváttum, sum uppreisn Kristusar. Hægstarættardómari í Onglandi, Lord Darling, hevur sagt: "Eingin mentaður og vitborin nevningadómstólur í heiminum hevði kunnað annað enn komið til ta niðurstøðu, at frásøgnin um uppreisn Harrans er sonn!"**

PÁSKIR OG UPPREISN
*Rúna Sivertsen*

Orðini omanfyri eigur Zacharias Zachariassen, sum í mong ár hevur granskað í uppreisn Jeusar. Fyri kortum gav hann út bók, hann kallar, "Kreftir hins komandi heim".

Sum ungur fór Zacharias til Onglands á bíbliuskúla, har hann las í 3 ár. Síðani hevur hann virkað her heima sum trúboðari í yvir 40 ár.

- Tað, sum hevur størstan týdning fyri eitt menniskja, er at hava fast undir fótum. Tað er umráðandi at vita, at tilveran eftir hetta lívið er verulig, sigur hann.

Zacharias sigur, at søgan um Jesu deyða og uppreisn hevur verið alt hansara lív, og hevur havt hansara størsta áhuga.

- Hetta er veruleikin, sum eg byggi lívið og ævinleikan á, sigur hann.



*Zacharias Zachariassen hevur í mong ár granskað uppreisnina. - Orsøkin er, at eg haldi tað vera mest týðandi fyri eitt menniskja at hava fast undir fótum, sigur hann*
*(Mynd Per á Hædd)*

Hann sigur, at hetta er hitt størsta og dýrasta evni í allari skriftini, kjarnin í sjálvum gleðiboðskapinum og øllum sonnum kristindómi: At Harrin Jesus læt lívsblóð sítt fyri okkum og sigursríkur triðja dagin reis upp aftur frá hinum deyðu!

### Einfaldur boðskapur

- Hóast evni snýr seg um djúpar gudfrøðisligligar spurningar, eru tað kortini einfaldastu sannleikar, sum enntá smábørnini duga at fata og virðismeta, sigur hann.

Zacharias sigur, at deyði Jeusar var ólíkur øllum øðrum deyðum. Deyði hansara var framúrskarandi og av djúpasta týdningi, tí hann var avgjørdur frammanundan.

Hann sigur víðari, at Jesus doyði ikki av elli, sjúku ella vanlukku. Heldur ikki tók hann lív sítt sjálvur. Hann gav ikki bara lív sítt, men hann gav seg í hendurnar á menniskjum til líðing. Hann doyði sum loysigjald og varð sigurharri yvir grøvini.

### Torført at trúgva

Tað er ikki so torført at trúgva, at Jesus einaferð livdi og búði millum menniskju. Tað er heldur ikki so torført at trúgva, at hann varð píndur og krossfestur, til hann at enda doyði. Torførari er at trúgva, at hann reis uppaftur frá teimum deyðu.

Men hetta er Zacharias als ikki í iva um. Hann hevur gjøgnum árini lisið og granskað hetta evnið gjølla og hildið eitt ótal av røðum og fyrilestrum um Jesu uppreisn. Umframt bøkur hevur hann eisini givið út fløgur, sum viðgera kreftir hins komandi heims.

- Uppreisn Kristusar - og uppreisnin í heila tikið hevur altíð verið og er framvegis eitt sera forvitnisligt og týdningarmikið, men umstrítt evni, sigur hann m.a. í bók sínari.

Hann vísir á tað, sum Jesus segði við saddukeararnar, sum ikki trúðu upp á einglar, andar og heldur ikki upp á uppreisnina: "Tit villast, tí tit kenna ikki skriftirnar, ei heldur mátt Guds!"

Í eini og hvørji rættarsøk er av størsta týdningi, at sonn og álítandi vitni eru tøk og vitnisfrágreiðing teirra til skjals. Ein og hvør søk stendur føst við tveimum ella trimum vitnum, sigur bíblian. Álítandi vitni eru mong fyri uppreisn Kristusar, sigur Zacharias og nevnir øll tey mongu, sum sóu Jesus, eftir at hann var upprisin.

### Grøvin er tóm

Í bókini," Kreftir hins komandi heims", sigur høvundurin eisini, at Kristindómurin stendur og fellur við uppreisnini. Tak uppreisnina burtur, og allur kristindómurin skramblar saman. Trýrt tú á Jesus Kristus, so trýrt tú uppreisnini. Trýrt tú ikki uppreisnini, so missir tú alt og hevur eftir bert ein hjálparleysan Jesus eftir.

Munurin millum kristindómin og heimsreligiónirnar er, at tú finnur gravirnar, har leiðarar teirra liggja jarðaðir, men grøv Jesusar er tóm.

Henda lítla søgan úr India, sum vit eisini hava funnið í bókini hjá Zachariasi, er eitt gott dømi um, hvussu fátæksligur gleðiboðskapurin hevði verið, um vit ikki trúðu, at Jesus er upprisin.

Ein trúboðari í India greiðir frá, at ein dagin, hann kom til ein bý har í landinum, var ein stór skrúðgonga við túsundtals fólkum. Tey komu við frøi og fagnaði gjøgnum gøturnar, tí teir í eini grøv høvdu funnið eitt bein og nakrar leivdir eftir ein av teirra stóru gudsmonnum, einum halgimenni í India. Tá helt kristni trúboðarin fyri: "Hvussu rámandi satt tað er, at mótvegis hesum mikla fagnaði, hevði tað verið ein stórur sorgarleikur fyri kristindómin, um onkur hevði funnið eitt bein ella leivdirnar av likami Jesusar í grøv Hansara".





*Her sita tey í runding og fundera yvir pínslusøgu Jesusar. Fyrsti drongurin frá vinstur er Bogi av Vollanum, síðan Steffan av Smið, báðir úr Kalbak. Síðan Maria Sverrisdóttir, Brynhild Haraldsen, Anna Elisabeth Christiansen, Anna Hádal og Anna N. Joensen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Jesus bleiv smíðaður á krossin

BARNAGARÐSPRÁT
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Man fær ræðuliga ilt, tá man blívur smíðaður á krossin og man doyr nakrar dagar av tí, sigur seks ára gamli Bogi av Vollanum úr Kalbak. Hann fer í skúla eftir summarfríðtíðina og nú gongur hann í skúlabólki á barnagarðinum Inni á Gøtu.

Høgtíð er fyri framman og tað ávirkar eisini lívið í barnagørðunum kring landið. Inni á Gøtu hava børnini gjørt páskapynt og hetta skal seljast til foreldrini fyri fastsettan prís. Tað sum inn kemur av peningi skal nýtast til ein burgaratúr í SMS.

Hvørjar hugsanir gera børn í seks ára aldrinum um páskirnar, og hví vit halda páskir. Vit settu skúlabólkinum Inni á Gøtu stevnu fríggjamorgunin, eina viku undan Langafríggjadegi, fyri at lodda dýpið. Nøkur av børnunum eru longu sjey ár, og tey sum enn eru seks vita akkurát hvussu nógvar vikur eru eftir til tey fylla sjey.

»Latið smábørnini koma til mín, forði teimum tað ikki«, segði meistarin sjálvur. Her er tað sum nøkur smábørn halda um pínslusøgu Jesusar:

- Vit halda páskir,tí Jesus blev smíðaður upp á ein kross sigur Anna Hádal. Hon er longu sjey ár og býr Inni á Gøtu. »Nummar 120,« leggur hon aftur at. Í Kalbak hava tey slett ikki húsanummør, so hon kennir seg eitt sindur ernan millum tey trý kalbaksbørnini í flokkinum. »Hann bleiv smíðaður, tí hinir vóru so øvundsjúkir inn á hann, tí hann bara gjørdi gott,« sigur hon

- Eg veiti ikki ordiliga hvussu hann blev smíðaður upp á ein kross. Men hann bleiv smíðaður, tí eg havi sæð filmin. Eg havi eisini spælt sjónleik um Jesus. Eg var ránsmaðurin, sigur Bogi av Vollanum.



*Bogi av Vollanum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Steffan á Smið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Slapp tú í himmiríki?

- Ja, eg slapp, men Sveinur slapp ikki. (tað var hann sum spældi hin ránsmaðurin, sum háðaði Jesus, red). Hann slapp ikki, tí hann doyði í synd, sigur Bogi av Vollanum.

Tey eru øll samd um, at Jesus fekk ræðuliga ilt. Onkur helt, at hann doyði beinanvegið,men onnur ivast. Eitt nú Niklas Joensen.

- Man doyr aftan á níggju tímar. Veit ikki hví,men tað tekur níggju tímar. Ella var tað seks, mamma sigur níggju tímar, men eg veit ikki.

Og hvat hendi so?

- So var hann deyður og so fór hann ikki í grøvina og hann lá bara har deyður.. Tríggjar dagar aftaná bleiv hann risin uppaftur. Og tá hann vaknaði var hann í himmalinum. Tá sóu fólk hann, men nú síggi eg hann ikki. Hann er luft, hann er eitt bestemt stórt skíggj., sigur seks ára gamli Stefan á Smið úr Kalbak.

- Hann er størstur í allari verðini. Hann er størri enn Legoland. Hann behøvist ikki at fara umborð á Norrønu fyri at fara til Danmarkar. Hann gongur bara sigur Stefan og hann leggur afturat.

- Tá man gongur langt út druknar man, men ikki tá man er í dykkaradrakt. Men Jesus behøvdist ikki dykkaradrakt. Hann var so stórur, at hann kundi ganga á vatninum sigur Stefan.

- Í dag er Jesus luft. Hann kann sveiggja í trøunum og í gardinunum, men vit síggja hann ikki, vit kunnu føla hann millum fingrarnar, siga øll við ein munn.

Hava tit nakrantíð snakkað við Jesus?

- Tá vit biðja Faðir Vár, tá snakka vit við Jesus. Hann svarar, men vit hoyra tað ikki. Men tá vit gera okkurt forkert og angra tað, so snakkar hann við okkum, sigur Adina Martinsdóttir Dam, sum er seks ár og verður sjey um seks vikur.

Hvat segði Jesus? Og her svara øll við ein munn.

- Tað er fullgjørt. Eg eri liðugur. Eg havi vunnið móti øllum teimum óndu!

Hvussu sær Jesus út?

- Hann hevði langt hár, sigur Bogi av Vollanum.

- Hann hevur langt brúnt hár, sigur Adina Martinsdóttir Dam.

- Nei, hann hevur langt hvítt hár, og hárið hjá honum er ikki cool, sigur Brynhild Maria Haraldsen.

- Jesus hevur hálvlangt hár, sigur Oddvør.

- Jesus hevur ikki ordilig klæðir. Hann hevur eitt lak, sigur Steffan á Smið.

- Ongin í verðini hevur so langt hár sum Jesus. Jú ein postmaður sum gongur her Inni á Gøtu. Hann hevur langt og krúllut hár og skegg líkasum Jesus, so hann líkist faktisk Jesus, sigur Anna Hádal úr Niðarugøtu.

Og postmaðurin hon sipar til er ongin minni enn Heðin Luid, so er tað fingið upp á pláss.

Á páskum pynta vit páskaregg, men hví gera vit tað?

- Vit hava páskaregg fyri at eta tey. Eg haldi ikki, at Jesus dámdi páskaregg, tí hann dámdi bara at eta sunt, sigur seks ára gamla Anna Nolsøe Joensen.

- Jesus er so stórur, at hann etir ikki páskaregg, roynir 7 ára gamla Brynhild Maria Haraldsen at rætta Onnu. Men so gerst hon hugsunnarsom og sigur: »Men babba eigur eitt páskaregg, og hann er stórur.

- Páskaliljur koma á páskum, tað er tí Jesus hevur luktað til tær, sigur Adina.